

# Heine Lützen á Summar Festival

**Heine Lützen, sum júst hevur givið nýggja fløgu út, fer at spæla á Summar Festivalinum í ár.**

**Heine Lützen telist millum bestu og mest virknu føroysku gospelsangarararnar, og hann hevur júst givið nýggja fløgu út, har hann hevur latið sálmar í nýggjan búnað. Fløgan hevur selt væl, og Heine hevur eisini havt onkra framførslur við sangum av útgávuni.**

**Í august spælir Heine Lützen aftur á Summar Festivalinum. Hann hevur áður havt framførslur á landsins størsta festivali, men fyrireikararnir eru sera fegnir um at bjóða honum vælkomnum aftur á festivalin.**

**Heine Lützen syngur fjølbroyttan gospeltónleik. Hann dugir at bera fram teir stillu og eymu sangirnar, og hann dugir sanniliga eisini at lata áhoyrarunum eina góða, rokkuta útgávu av onkrum kendum sálmi.**

*eirikur@sosialurin.fo*

# Gamlamannadansur



Hesir báðir vilja hava gomlu valskipanina aftur

## Í MORGIN

**5 / 8°C**



7-12 m/s — 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

## FRÍGGJADAGIN

**5 / 8°C**



7-12 m/s — 7-12 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

## LEYGARDAGIN

**6 / 9°C**



11-16 m/s — 11-16 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og sunnudagin ælingur, men mánadagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt.**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. yvir Eystur-Grønlandi fer í landsynning og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer spakuliga suðureftir og brúgvalagið yvir Føroyum fer spakuliga eystureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 6 | Tromsø | 4 | Moskva | 19 | Athen | 24 |
| Reykjavík | 10 | Bergen | 8 | Berlin | 15 | Beijing | 22 |
| Tórshavn | 3 | Oslo | 11 | Paris | 16 | New Dehli | 38 |
| Lerwick | 5 | Stokkhólm | 8 | Madrid | 16 | Bangkok | 38 |
| Aberdeen | 10 | Keypmannah. | 8 | Róm | 19 | Sydney | 23 |
| London | 9 | Helsinki | 4 | Malorca | 21 | New York | 11 |

## VESTFALLSKYRRINDI

6. mai — Seinna kvarter
Mánin longst frá jørðini
14. mai — Tendring
20. mai — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. mai | 05:55 | 18:16 | 04:55 | 17:16 | 05:10 | 17:31 | 07:55 | 20:16 | 08:55 | 21:16 | 04:10 | 16:31 | 03:10 | 15:31 | 06:10 | 18:31 | 07:10 | 19:31 | 05:40 | 18:01 | 06:55 | 19:16 |
| 13. mai | 06:39 | 19:03 | 05:39 | 18:03 | 05:54 | 18:18 | 08:39 | 21:03 | 09:39 | 22:03 | 04:54 | 17:18 | 03:54 | 16:18 | 06:54 | 19:18 | 07:54 | 20:18 | 06:24 | 18:48 | 07:39 | 20:03 |
| 14. mai | 07:28 | 19:53 | 06:28 | 18:53 | 06:43 | 19:08 | 09:28 | 21:53 | 10:28 | 22:53 | 05:43 | 18:08 | 04:43 | 17:08 | 07:43 | 20:08 | 08:43 | 21:08 | 07:13 | 19:38 | 08:28 | 20:53 |
| 15. mai | 08:19 | 20:45 | 07:19 | 19:45 | 07:34 | 20:00 | 10:19 | 22:45 | 11:19 | 23:45 | 06:34 | 19:00 | 05:34 | 18:00 | 08:34 | 21:00 | 09:34 | 22:00 | 08:04 | 20:30 | 09:19 | 21:45 |
| 16. mai | 09:11 | 21:38 | 08:11 | 20:38 | 08:26 | 20:53 | 11:11 | 23:38 | - | 12:11 | 07:26 | 19:53 | 06:26 | 18:53 | 09:26 | 21:53 | 10:26 | 22:53 | 08:56 | 21:23 | 10:11 | 22:38 |